# Fimleikafagnaðurin á Kykmyndum

Í gjár høvdu vit bert eitt lítið brot frá fimleikafagnaðinum á Kykmyndum hjá portalinum. Nú ber til at síggja allar fýra framførslurnar frá fimleikafegnaðinum á Kykmyndum. Til ber at síggja framførsluna hjá vinnarunum úr Støkk, framførsluna hjá Havnar Fimleikafelag, framførsluna hjá Ljósinum og tí hjá Flog í heilum líki.



# Venjarar fingið prógv

Í apríl 2005 fekk FSF grønt ljós at fara í holt við A-útbúgvingina fyri føroyskar fótbóltsvenjarar. Sunnudagin var so hátíðarhald í FSF-húsinum, tá ið nakrir venjarar fingu handað FSF A-venjaradiplom. Venjararnir vóru: Standandi: Jens Martin Knudsen, Heðin Askham, Finn Johannesen, Pól F. Joensen, Pauli Poulsen, Piotr Krakowski. Sitandi: Milan Cimburovic, Álvur Hansen, Oddbjørn Joensen, Bill McLeod Jacobsen, Pætur S. Clementsen, Eyðun Klakstein.



*Fimleikahøllin í Glyvra skúla var stúgvandi full av støkkarum og stuðlum mánakvøldið.*

kvinnurnar vunnu føroyameistaraskapin í estetiskum fimleiki, og sunnudagin vóru umleið 100 fimleikarar hjá felagnum við til at vinna fimleikafagnaðin, og harvið ferðasteypið til ognar.

Vit eru heilt ótrúliga væl nøgd við hetta seinasta árið, sigur Unn Steingrund, forkvinna í starvsnevndini hjá Støkk. Alt hevur gingið sum eftiránni. Fimleikaligu úrslitini hava verið framúr góð, og at vit harafturat hava fingið Norðoya Sparikassa sum høvuðsstuðul, er heilt fantastiskt. Tað ger arbeiðið hjá okkum nógv lættari, og ikki minst hugaligari. Runavíkar Kommuna hevur eisini stuðlað okkum væl, bæði fíggjarliga, og tá ið hugsað verður um venjingarhøli. Felagið hevur eina sera spennandi framtíð í væntu; okkara fimleikarar hava ment seg sera nógv seinastu árini, og nú verður nýggja Støkkhøllin eisini skjótt veruleiki, so tað gongur heilt ótrúliga væl í løtuni.

### Nýggir búnar

Seinastu nógvu árini hevur Støkk havt sín eyðkenda búna, sum hevur verið hin sami síðani fyrst í 1990'-unum; men til fimleikafagnaðin í ár var ein nýggjur búni at síggja. –Vit hava leingi tosað um at fáa nýggjar búnar til felagið, men tað er ongantíð komið so langt. -Og nú, vit hava fingið Norðoya Sparikassa til høvuðsstuðul, hildu vit tað vera eina sjálvfylgju, at teir síggjast aftur á búnunum hjá okkum, sigur Unn Steingrund. Nýggju draktirnar eru sera snøggar, og eisini nógv bíligari enn hinar gomlu, sum vóru hondseymaðar her í kommununi, sigur hon. Og sigast kann, at fimleikararnir veruliga hava tikið væl ímóti nýggja búnanum, tí hóast teir eru komnir fyri heilt stuttari tíð síðani, høvdu næstan øll keypt sær nýggja búnan til fimleikafagnaðin, so tað gleðast vit um, leggur hon afturat.

### Støkk 40 ár

Hósdagin 23. november fyllir Støkk 40 ár, og hetta verður sjálvsagt hátíðarhildið. Enn eru øll tiltøkini ikki komin upp á pláss, men vit fara í øllum førum at hava eina fimleikaframsýning í ítróttarhøllini í Runavík fríggjadagin 25. november. Umframt ymisk framsýningarlið, verður fimleikafagnaðurin hjá okkum sjálvsagt eisini vístur enn einaferð, so tað verður spennandi, sigur ein væl nøgd forkvinna at enda.



*Afturvið drekka fingu tey vitjandi bæði karamellur, smákøkur og tvær sera vakrar Støkk-lagkøkur.*



# KÍ gjørt sáttmála við Gunnar Nielsen

**Argentinski fótbóltsspælarin Gunnar Guillermo Nielsen skrivaði mánadagin undir sáttmála við KÍ fyri næsta kappingarár.**

TÍÐINDASKRIV

Gunnar er ættaður úr Argentina, og hann spældi í sínum ungdómsdøgum fyri Boca Juniors í Buenos Aires. Seinnu árini hevur Gunnar spælt í Føroyum - fyri ÍF og GÍ - men áðrenn hann kom til Føroya, spældi hann eina tíð í Danmark. Tá spældi hann fyri FC Norsdjælland, FC Århus og Kolding FC.

Næsta kappingarár verður Gunnar so at síggja í KÍ-troyggjuni, og leiðslan í KÍ fegnast um, at liðið verður styrkt við ein slíkum spælara. Gunnar er tekniskt sera sterkur, hann kann spæla álopssinnaður miðvallari ella í álopinum, og í tíðini í Føroyum hevur hann víst sínar framúr fótbóltsligu dygdir.